Starvsmannafelagið:

# Almennir stovnar misnýta Barsilsskipanina

**– Barsilsskipanin skal vera ein skipan, ið tryggjar løntakarar og arbeiðspláss fíggjarliga, tá fólk fara í barnsburðarfarloyvi. Men vit kenna fleiri dømi um, at almennir stovnar lata vera við at seta fólk í starv, tá onnur fara í barsil, og harvið nýta Barsilsskipanina sum eina fjalda inntøkukeldu. Tað sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, sum hevur sent bræv til Vinnumálaráðið og Vinnunevndina, har hann hvassliga finst at mannagongdini hjá almennu stovnunum**



*– Vit vita um, at almennir stovnar ikki seta avloysarar fyri fólk, sum fer í brnsburðarfarloyvi, men bara heinta stuðulin, tvs. lønarendurgjaldið, úr Barsilsskipanini. Á henda hátt verður skipanin nýtt sum ein beinleiðis inntøkukeldu hjá almennu stovnunum, og tað er groft misbrúk av skipanini, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

BARSILSSKIPANIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Almennir stovnar nýta barsilsskipanina sum eina beinleiðis inntøkukeldu, fyri á tann hátt at royna at betra fíggjarligu orku teirra. Hetta verður gjørt við at lata vera við at seta fólk í starv, tá onnur á stovninum fara í barnsburðarfarloyvi. Í staðin skulu hini á stovninum bara arbeiða tað skjótari, samtíðis sum stovnurin sparir lønarútreiðslur.

Hetta ger Starvsmannafelagið vart við í brævi, sum felagið hevur sent bæði til Vinnumálaráðið og Vinnunevndina í Løgtinginum. Starvsmannafelagið finst hvassliga at hesi mannagongd, sum felagið sigur seg kenna fleiri dømi um veruliga fara fram á almennum stovnum.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum vísir á, at Barsilsskipanin skal vera ein skipan, ið tryggjar bæði løntakara og arbeiðsplássið. Løntakarin skal hava møguleika at sleppa í barnsburðarfarloyvi við løn, og arbeiðsplássið skal hava møguleika at seta annað fólk ístaðin, tíðina viðkomandi er í farloyvi. Talan er um eina skipan, ið er »útreiðsluneutral«, tvs. uttan eykakostnað, fyri báðar partar.

Men formaðurin í Starvsmannafelagnum veit um fleiri dømi, har almenn arbeiðspláss lata vera við at seta annað fólk í starv, tá teirra egnu starvsfólk fara í barnsburðarfarloyvi.

– Vit vita um, at almennir stovnar í samband við barnsburðarfarloyvi ikki seta avloysarar fyri tann, sum fer í farloyvi, men bara heinta stuðulin, tvs. lønarendurgjaldið, úr Barsilsskipanini. Á henda hátt verður skipanin nýtt sum ein beinleiðis inntøkukeldu hjá almennu stovnunum, fyri at royna at betra um fíggjarligu orkuna. Hetta er groft misbrúk av skipanini, sigur Gunnleivur Dalsgarð

Hann metir tað vera grundleggjandi skeivt at Barsilsskipanin, ið arbeiðsmarknaðurin lutvíst sjálvur ber kostnaðin av, skal kunna nýtast sum ein beinleiðis inntøkukelda hjá almennum stovnum, ið snúgva sær undan at seta onnur fólk í starv, tíðarskeiði tá starvsfólk eru í barnsburðarfarloyvi.

Umframt at Barsilsskipanin við hesum gerst ein beinleiðis inntøkukelda hjá almennu stovnunum, so eru dømini sera óheppin fyri hini starvsfólkini á tí einstaka stovninum.

– Tá stovnar ikki seta onnur fólk at avloysa tey, ið fara í barnsburðarfarloyvi, so merkir tað samtíðis, at arbeiðsbyrðan økist og uppgávurnar gerast fleiri hjá teimum, ið eftir eru á arbeiðsplássinum, vísir Gunnleivur Dalsgarð á.

### Fer at vinda uppá seg

Formaðurin í Starvsmannafelagnum óttast, at nú so nógv hoyrist um, at tað almenna skal spara, fer tað at gerast alt meira vanligt, at almennir stovnar fara at útnytta møguleikan at lata vera við at seta onnur fólk í starv, tá starvsfólk teirra fara í barnsburðarfarloyvi.

– Eg eri ikki í iva um, at henda gongd, har almennir stovnar misnýta Barsilsskipanina, fer at vinda uppá seg, nú tosað verður um, at stovnarnir skulu spara og rationaliserast, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Nú Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur lagt uppskot fyri løgtingið um at broyta Barsilsskipanina, heitir Starvsmannafelagið á politiska myndugleikan um at fáa viðurskiftini í rættlag, so skipanin ikki kann misnýtast. Í brævi, sum felagið hevur sent, bæði til Vinnumálaráðið og Vinnunevndina í løgtinginum, mælir Starvsmannafelagið til, at tað kemur at standa beinleiðis í lógini, at almennir stovnar skulu kunna staðfesta eina útreiðslu, tvs. seta avloysarar í starv, fyri at fáa pengar úr Barsilsskipanini.

# Stovnsleiðarar mugu hava ávíst frælsi at stýra

**Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ið eisini er arbeiðsgevarin hjá almennum starvsfólkum, er ikki samdur við Gunnleiv Darlgarð, tá hesin førir fram, at almennir stovnar misnýta Barsilsskipanina. Hann vísir samtíðis á, at stovnsleiðarar mugu hava møguleika til í ávísan mun at stýra lønarútreiðslunum, og reka stovnin við færri starvsfólkum í styttri tíðarskeið, meta teir tað vera ráðiligt**

BARSILSSKIPANIN
*Jón Brian Hvidfeldt*

– Stovnsleiðarar mugu hava myndugleika til í ávísan mun at stýra lønarútreiðslunum á stovninum, soleiðis at til ber at spara, gerst tað neyðugt. Millum annað við í styttri tíðarskeið at nýta spardar lønarútreiðslur til aðrar útreiðslur, gerst tað neyðugt fyri at halda játtanina. Tað sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sum eisini er arbeiðsgevarin hjá almennu starvsfólkunum. Hann leggur tó afturat, at tað ikki er politikkurin hjá Fíggjarmálaráðnum, at sparingar skulu gerast við bevíst at lata vera við at seta onnur fólk í starv, tá starvsfólk eru í barnsburðarfarloyvi.

Karsten Hansen sigur seg ikki kenna til ítøkilig dømi um, at stovnsleiðarar lata vera við at seta onnur í starv fyri tey, ið fara í barsil. Men hann leggur afturat, at tað er ikki óhugsandi, at onkur ger tað. Og landsstýrismaðurin metir ikki, at tað er skeivt, at stovnsleiðarar hava henda møguleika, verður hann nýttur í samstarv við hini starvsfólkini, og kunnu pengarnir nýtast betri aðrastaðni á stovninum.

– Tað kann hugsast, at stovnsleiðarar meta tað vera skilabest ikki at seta avloysara í starv í nakrar fáar mánaðir. Orsøkin kann vera, at teir hava trupult við at halda játtanina hjá stovninum, ella tí at onkur óvæntað útreiðsla stingur seg upp í rakstrinum, sigur Karsten Hansen.

Hann vísir á, at stovnsleiðarar hava ikki møguleika at flyta pengar frá rakstrinum til lønir. Men tó ber til at flyta spardar pengar á lønarkontoini til raksturin á stovnunum.

– Stovnsleiðarar hava altíð henda møguleika at regulera lønarútreiðslunar og spara lønir í nakrar mánaðir, m.a. tá nýggj størv skulu setast, og eisini tá fólk fara í barnsburðarfarloyvi. Men verður tað gjørt til siðvenju, so kundi tað bent á, at ov nógv starvsfólk eru á stovninum. Og er tað tilfeldið, so er tað uppgávan hjá stovnsleiðaranum at minka um starvsfólkatalið á stovninum, vísir Karsten Hansen á.

### Skilir ikki atfinningarnar

Karsten Hansen, landsstýrismaður, skilir ikki rættuliga atfinningarnar hjá Starvsmannafelagnum.

– Eg má siga, at eg sum so ikki dugi at síggja trupulleikan. Tað kann jú vera, at stovnsleiðarin, í semju við starvsfólkið, metir at pengarnir, ið annars skuldu verið nýttir til at seta ein avloysara í starv í styttri tíðarskeið, kunnu nýtast betri aðrastaðni á stovninum, sigur Karsten Hansen.

Hann ásannar, at í ávísum føri kann ein stovnsleiðari kenna seg noyddan at spara á lønarsíðuni síðstu mánaðirnar á árinum, fyri at halda seg innanfyri játtanina til stovinin. Spurdur, hvørt tað er rætt, at Barsilsskipanin skal gjalda fyri, at fíggjarætlanin hjá stovninum kann hanga saman, sigur Karsten Hansen, at tað sum útgangsstøði er skeivt at nýta Barsilsskipanina til hetta endamál.

– Endamálið við Barsilsskipanini er fyrst og fremst at veita foreldrum fíggjarligan møguleika at vera heima hjá nýfødda barn-inum fyrstu tíðina, og eg havi ikki varhugan av, at almennir stovnar nýta skipanina til at spara pengar. Men tó meti eg, at skipanin skal ikki vera so stirvin, at stovnsleiðarar missa møguleikan í styttri tíðarskeið at raðfesta pengarnar aðrastaðni enn til ein avloysara, meta teir tað vera rættast.

Karsten Hansen sigur at Fíggjarmálaráðið hevur sum so onki eftirlit við, hvørt stovnsleiðarar veruliga seta avloysarar í starv, tá starvsfólk fara í barnsburðarfarloyvi, eins og ráðið heldur ikki kannar, hvørt leys størv vera sett beinanvegin eftir at onnur eru farin úr teimum.

Barsilsskipanin:

# Ikki okkara borð

**Stjórin á ALS, ið eisini umsitur útgjaldið úr Barsilsskipanini, sigur, at skipanini ikki leggur seg út í, um arbeiðsplássið setur annað fólk í starv fyri tað, ið fer í barnsburðarfarloyvi. Peningurin verður játtaður arbeiðsplássinum sum lønarendurgjald til starvsfólkið í barsil, onnur viðurskifti á arbeiðsplássinum leggja vit okkum ikki útí, sigur Elisabeth O. Gaardbo**

BARSILSSKIPANIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Elisabeth O. Gaardbo, stjóri á ALS, sum eisini umsitur útgjaldið úr Barsilsskipanini, sigur seg ikki kenna til dømi um, at almennir stovnar lata vera við at seta onnur fólk í starv, meðan onnur eru í barsil.

Men samtíðis vísir hon á, at Barsilsskipanin ikki leggur seg útí, hvørt arbeiðspláss seta onnur fólk í starv fyri tey, ið fara í barnsburðarfarloyvi. Hetta er heldur ikki uppgávan hjá Barsilsskipanini.

– Uppgávan hjá Barsilsskipanini er stutt og greitt at veita arbeiðsplássum endurgjald fyri lønarútreiðslur til starvsfólk, sum eru í barnsburðarfarloyvi. Hetta verður gjørt, eftir at bæði arbeiðsgevari og starvsfólkið sjálvt hevur váttað, at viðkomandi er í barnsburðarfarloyvi, sigur Elisabeth O. Gaardbo.

Barsilsskipanin leggur seg ikki útí, hvat síðan hendir á arbeiðsplássinum, tí skipanin koyrir einsíðis uppá, at ein persónur fer í barsil.

– Vit leggja okkum ikki útí, hvat stovnarnir síðan gera, tá lønarendurgjaldið úr Barsilsskipanini er komið uppá pláss, og tí veit eg ikki, um stovnar nýta hesa mannagongd, sigur Elisabeth O. Gaardbo.



# Hart og kontant at verða mamma



*Pápar taka karrieruna fram um børnini, men teir skuldu verið noyddir heim í barnsburð, halda fleiri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tað gongur út yvir kvinnurnar, um páparnir ikki taka ein part av longda barnsburðarfarloyvinum. Tað eru Javnstøðunevndin, Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið samd um. Kanningar vísa, at støðan hjá kvinnum á arbeiðsmarknaðinum versnar, tá hon fer í farloyvi. Kortini eru ongar ætlanir um at seta í lógina, at pápar skulu taka ein part av tíðini**

BARSILSFARLOYVI
*Ingi Rasmussen*

»Í veruleikanum eiga kvinnur at rópa: Vit vilja ikki hava longri barsilsfarloyvi. Tí tess longri vit eru burtur frá arbeiðsmarknaðinum, tess harðari verða vit revsað.«

So bersøgin er nationaløkonomurin Mette Verner, sum saman við øðrum á Handilsháskúlanum í Århus nýliga hevur kannað lønarligu avleiðingarnar fyri kvinnur at fáa børn. Og tær eru negativar - peningaliga sæð. Serliga um kvinnan arbeiðir í privatu vinnuni, sum revsar kvinnur, ið fáa børn, hart og kontant.

Mammur fáa upp í 20 prosent minni í løn enn barnleysar kvinnur. Børnini kosta altso kvinnunum pengar, meðan menninir tvørturímóti gerast ríkari, tá teir verða pápar, vísir kanningin.

Ein orsøk til hesa gongd er, at tað oftast er kvinnan, sum fer eitt heilt ár í barsilsfarloyvi, tá børnini koma í verðina. Pápin tekur hinvegin oftast hægst nakrar dagar frí, tá barnið er borið, og heldur annars fram við at røkja karrieruna og klatra upp eftir lønarstiganum.

### Longt barsil

Í Føroyum verður barsilsskipanin broytt í hesum døgum. Rætturin til barsilsfarloyvi skal leingjast úr teimum núverandi 24 vikunum upp í 52 vikur. Í fyrstu syftu tó uttan løn fyri økta rættin til farloyvi.

Sum er, eigur mamman rætt til fýra vikur áðrenn og 14 vikur eftir barnsburð. Síðan eru 10 vikur afturat, sum mamman og pápin kunnu býta sínámillum eftir egnum ynski. Tað er onki krav um, at pápin skal taka ein part av hesum.

Nú hevur landsstýrið skotið upp, at tær 10 vikurnar verða longdar til 38 vikur, sum foreldrini kunnu býta sínámillum. Tað er framvegis onki krav um, at pápin skal taka sín part av farloyvinum. Og royndirnar vísa, at so vera kvinnurnar heima hjá børnunum í eitt ár. Hesa sannroynd átalar Turið Debes Hentze, sum hevur gjørt viðmerkingar til uppskotið vegna Javnstøðunevndina.

### Pápakvotu, takk

Javnstøðunevndin skýtir upp, at tað verður kravt í lógini, at páparnir skulu taka ein part av økta farloyvinum. Um teir ikki vilja, skal tann kvotan detta burtur, heldur hon.

– Eg eri fyri kvotering av pápadøgum til tess at stýra eini gongd móti javnstøðu á hesum øki. Tað eri eg, tí eg haldi, at løtan er tann rætta, og tí at spurningurin um kvotering her kemur sum eitt ískoyti til ein longu lógartryggjaðan rætt, sigur Turið Debes Hentze.

Javnstøðunevndin ger vart við, at kvinnurnar ikki eru eins væl umboðaðar á arbeiðsmarknaðinum sum menninir – og als ikki í lønarhæddum – og menninir eru í stórum undirtali, tá tað snýr seg um at vera heima í barsilsfarloyi.

– Tá kvinnan og ikki maðurin nýtir barnsburðarfarloyvi – eisini tær seinastu 38 vikurnar – er tað ikki altíð tí, at hon sjálv ynskir tað so. Kanska fær tað illa verið øðrvísi, sjálvt um hon hevur annað arbeiði at røkja. Tekur hon alt farloyvið, so er tað hon, sum verður burtur frá arbeiði tað longri. Hetta merkir sjálvandi, at arbeiðsgevarar staðfesta, at burðardyggar kvinnur eru ein meiri ótrygg arbeiðsmegi. So er lættari at seta ein mann – hann fer ongan veg, sigur Turið Debes Hentze.

### Hond í hond

Hetta er ikki bara eitt reyðsokkasjónarmið, sum Javnstøðunevndin førir fram, tí Føroya Arbeiðsgevarafelag leggur á sama bógv. Felagið vísir á, at um kvinnan tekur fult barsilsfarloyvi, sum hon hevur møguleika til, so kann hon vera burtur frá arbeiðsmarknaðinum í 58 vikur. Tað er meira enn eitt ár, og tí kann uppskotið gera, at tað verður truplari hjá kvinnum at fáa arbeiði.

## FAKTA

**Barnsburðarfarloyvi skal økjast upp í 52 vikur, sigur eitt uppskot, sum er lagt fyri løgtingið. Sum er, skal mamman taka tær fyrstu 14 vikurnar, meðan mamman og pápin sjálv gera av, hvussu tey býta restina av tíðini ímillum sín. Aðrastaðni verður ein kvota sett av til páparnar, sum dettur burtur, um teir ikki gera sær dælt av henni. Men í Føroyum verður ikki hildið, at tað er neyðugt.**

- Ein óheppin avleiðing av hesum kann vera, at arbeiðsgevarar freistast at taka hetta við í metingina, tá størv skulu setast, við tað at kvinnur í burðardyggum aldri ikki eru at meta sum støðuføst arbeiðsmegi. Tað verður ofta meira møði enn føði at taka onnur starvsfólk inn eitt tíðarskeið, tí upplæringin tekur væl av tíð og krevur eyka orku, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

Arbeiðsgevarafelagið heldur, at eitt virki so dánt kann klára seg ígjøgnum fýra vikur áðrenn føðing, 24 vikur og summarfrí. Men er tíðarskeiðið 58 vikur, kann tað gerast trupult at klára seg uttan fasta starvsfólkið.

Í hesum førinum ganga sjálvt arbeiðsgevarar og fakfeløg hond í hond, tí Starvsmannafelagið mælir eins avgjørt til, at sett verður í lógina, at pápar skulu taka ein part av økta farloyvinum, sæst í ummælinum til lógaruppskotið.

### Rætt at gera mun

Hóast arbeiðsgevarar, fakfeløg og javnstøðufólk sostatt eru á einum máli, so er landsstýrismaðurin av aðrari áskoðan. Bjarni Djurholm segði við Sosialin í gjár, at hann er grundleggjandi ímóti at seta í lógina, at pápar skulu taka ein ávísan part av farloyvinum, tí tað eigur at vera upp til foreldrini sjálv at gera av.

Í hesum serliga føri heldur Javnstøðunevndin kortini, at tað er rætt at gera mun á kynunum og vísir til javnstøðulógina: "Veitast skal kvinnum og monnum eins møguleikar til útbúgving, arbeiði, yrkisliga og mentanarliga menning (…) Tað stríðir kortini ikki ímóti hesi lóg, at tryggjað verður øðrum kyninum serlig rættindi, tá ið hesi ætlast at náa endamáli lógarinnar."

Og meðan politikararnir kjakast um, hvat er rætt og skeivt, kunnu vit venda aftur til tað, sum Mette Verner av Handilsháskúlanum í Århus herfyri segði við Weekendavisen.

"Um barnið er eitt felags ynski, so er tað eisini ein felags uppgáva."